FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Februar 2024

**Hey hey** 😊

**HEVUR TÚ FINGIÐ STAÐFEST ADHD FRÁ OG VIÐ 15 ÁR ELLA ELDRI?**

**OG ERT TÚ MILLUM 18 OG 45 ÁR?**

**VIT HØVDU VERIÐ TAKKSAMAR UM TÚ VILDI VERID VIÐ TIL AT LÝSA TÍNAR UPPLIVINGAR, TÁ TÚ FEKST STAÐFEST ADHD?**

**OG FORTELJA OKKUM, HVUSSU TAÐ ER AT GANGA Í SKÚLA, TÁ EIN IKKI VEIT AV ADHD, ELLA HEVUR FINGIÐ TAÐ SEINT STAÐFEST?**

**Á HENDA HÁTT, KANST TÚ MØGULIGA VERA VIÐ TIL AT BETRA UM UMSTØÐUR, TÁ EIN HEVUR ADHD.**

**Les so víðari, og skriva, ring ella send SMS á tlf. +298 26 17 72 ella +298 53 96 86.**

Vinarlig Jórun og Paula

**Kunningarbræv viðvíkjandi kanning um ADHD**

Tú ert hervið boðin at vera við í einari kanning, sum masterlesandi á Heilsuvísindadeildini á Setrinum standa fyri.

Endamálið við kanningini er, at lýsa upplivingar av, at hava fingið staðfest ADHD frá og við 15 ár ella eldri, og tær upplivingar, ið hava verið í skúlatíðini, allan vegin uppeftir. Umleið 1% av øllum føroyingum høvdu í 2019 fingið staðfest ADHD, í mun til umleið 5% í londunum uttanum okkum. Tað eru fáar kanningar gjørdar í Føroyum, um at liva við ADHD og tí er umráðandi at gera kanningar, ið kunnu vísa á hvussu hetta upplivist.

Kanningin verður brúkt í próvtøku uppgávu á Setrinum. Áðrenn tú tekur støðu til um tú vilt luttaka, vinarliga les hesa kunning gjølla.

**Hvør kann luttaka?** Vit søkja luttakarar, ið eru millum 18 og 45 ár, ið hava fingið staðfest ADHD við 15 ár ella eldri. Tú skalt skilja føroyskt.

**Samrøðan** Kanningin fer fram sum ein samrøða, einstaklingainterview, ið ein lesandi tekur sær av, og ein annar lesandi verður við sum eygleiðari.

Samrøðan varir umleið ein tíma og verður bandað. Upptøkan verður niðurskrivað og goymd teldutøkt, við loyniorði, á Setrinum. Upplýsingar ið verða endurgivin í próvtøkuuppgávu verða sløraðar/broyttir, um teir á onkran hátt kunnu kennast aftur, í einum lítlum samfelagið sum Føroyum. Vit skulu geva loyvi, um uppgávan skal kunna lesast av øðrum enn próvdómara og vegleiðara.

Samrøðan verður hildin á einum stað har tú følir teg tryggan, og verður avtalað nærri við teg.

Kanningin verður gjørd sambært reglum um dátuvernd har nøvn og støð verða dulnevnd, og tey lesandi hava tagnarskyldu.

**Samtykki** verður undirskrivað av tær, har tú váttar, at tú hevur lisið kunning um kanningina, og gevur loyvi at brúka upplýsingar. Tú undirskrivar samtykkisváttan, ið vit hava við til samrøðuna. Tað er sjálvboðið at luttaka í kanningini og tú kanst altíð taka samtykki aftur, uttan grundgeving, og tá verður alt tilfarið slettað.

**Hvussu luttekur tú?** Set teg í samband okkum sum gera kanningina, **seinast 21. februar**, á teldupost, telefon, ella við SMS, sí niðanfyri. Eftir tað kontakta vit teg, um stað og tíð til kanningina.

Sí samtykkibræv niðanfyri.

Vinarliga

***Paula Sjóstein,*** *námsfrøðingur og tannrøktari*

Masterlesandi í heilsuvísindi, Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísind

Teldupostur: 2022.262@student.setur.fo    Ring ella send SMS á tlf.: +298 26 17 72

***Jórun Petersen,*** *fysioterapeutur*

Masterlesandi í heilsuvísindi, Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísind

Teldupostur: 2021.250@student.setur.fo    Ring ella send SMS á tlf. +298 53 96 86

Vegleiðari: Ása Róin, Lektari á deildin fyri heilsu og -sjúkarøktarvísind. Teldupostur: asar@setur.fo

# Samtykki

## Samtykkiváttan viðvíkjandi luttøku í interviewkanning.

Heitið á kanningini ”Upplivingin av, at hava fingið staðfest ADHD frá og við 15 ára aldur, og hvussu tað ávirkar skúlagongdina sum heild.”

**Váttan frá luttøkupersóni:**

Eg havi fingið kunning um kanningina og veit nóg mikið um endamálið og framferðarháttin til at eg kann játta luttøku.

Eg veit, at tað er sjálvboðið at luttaka, og at eg, nær tað skal vera og uttan at grundgeva fyri hví, kann taka meg úr kanningini aftur. Tá verður alt tilfar, sum er knýtt at samrøðuni við meg, strikað.

Navn á luttøkupersóni:

Dagfesting: Undirskrift: